**mat**
**ummælið**
mortan@hamrabyrgi.com

# Flusnar tomatir



Nú, beint fyri at tomat-sesongin í Evropa hevur vundið seg heilt upp, kunna frískar tomatir vera rættiliga keðiligar. Hava ferðast hálva leið um knøttin. Eru plukkaðar grønar og óbúnar. Og við ongum anga ella smakki, tá ið tær at enda koma til Føroyar.
Tá kunna flusnar tomatir á dós vera betri loysn í matgerð. Men er ein dós ein dós? Prísurin á dósa-tomatum er rættiliga javnur, men góðskan er sera ójøvn. Tað kann eg avdúka beinanvegin.
Grams hevur verið og leitað á handilshillarnar hjá FK, Samkeyp og Miklagarði. Nógvir variantir eru við tilsettum kryddi. Basilikum, hvítleyk osfr. Eg havi so valt ta reinu vøruna. At seta fokus á tomat-smakkin. Afturat teimum vanligu niðursjóðaðu tomatunum havi eg so eisini valt at taka við tvey dømi av mosaðum tomatum. Heili 9 sløg fann eg.
Annars kann eg upplýsa, at tað er rættiliga lætt at flysa tomatir sjálvur. Set frískar tomatir í kókandi vatn í 30 sekund. Síðani setur tomatir í ísakøldum vatni. Sker ein lítlan kross í toppin av tomatini og pilka síðan flusið av.
Skoðsmálini er latin í mun til smakk av frískari tomat.

**Mortan í Hamrabyrgi ummælir mat úr føroysku matvøruhandlunum. Skoðsmálini eru latin í mun til góðsku.**




**X-tra (FK)**

**kr. 5,95/400 g**
Lættur, fryskur, men sera vatnutur smakkur.
★★☆☆☆☆




**Bellaroma vistfrøðilig (Miklagarður)**

**kr. 9,95/400 g**
Hampuliga góður smakkur, men ikki so reinur.
★★★☆☆☆




**Food-Line (Samkeyp/Inn)**

**kr. 4,95/400 g**
Lættur, men vatnutur tomatsmakkur.
★★☆☆☆☆




**Änglamark vistfrøðilig (FK)**

**kr. 9,95/400 g**
Miðalgóður tomatsmakkur, men ikki so neyvur.
★★★☆☆☆




**Coop (FK)**

**kr. 7,95/400 g**
Lættur og ov sýrutur smakkur.
★★☆☆☆☆




**First Price (Samkeyp/Inn)**

kr. 5,95/400 g
Als eingin tomatsmakkur yvirhøvur, bara vatnutur greytur.
☆☆☆☆☆☆



**SuperGros (Miklagarður)**

**kr. 7,00/400 g**
Sera lættur og sera vatnutur smakkur.
★☆☆☆☆☆




**Coop Passata (FK)**

**kr. 7,95/500 g**
Góður og rímiliga samansettur tomatsmakkur.
★★★★☆☆



**Urtekram vistfrøðilig (FK)**

**kr. 19,95/680 g**
Sera góður tomatsmakkur. Gott alternativ til ta frísku vøruna í matgerð, super.
★★★★★☆